Bretar vilja sjálvir skera fiskin

Ein av orsøkunum til, at so nógvur heilur fiskur fer av landinum, er uttan iva, at keyparin vil hava arbeiði til egið arbeiðsfólk, heldur føroyskur virkisleiðari. Hann metir, at betri útflutningsmøguleikar í ringasta føri kunnu enda við, at enn meira heilur fiskur verður útfluttur

ÚTFLUTNINGUR
Edvard Joensen

Ein grund til, at so nógv heil hýsa fer av landinum, kann heilt einfalt vera, at bretar vilja skaffa egnum fólki arbeiði. Teir vilja ikki gjalda arbeiðsløn i Føroyum, metir Petur Mohr, virkisleiðari á Norðís.

Hann heldur, at í ringasta føri kunnu øktir útflutningsmøguleikar hjá føroyingum eisini enda við, at enn meira av heilum fiski fer av landinum. Men hinvegin gevur tað sjálvandi eisini heilt stórar møguleikar fyri at selja fesk fløk.

– Men tað velst so um, um vit sleppa at selja tey, sum hann tekur til.

Við tí sipar hann til, at tað er lættari hjá einum, sum bara hevur í huga at selja heilan fisk, at sleppa inn á marknaðin í eitt nú Bretlandi. Tað kann klárast við einum telefaksi, har so og so stór nøgd verður boðin fram. Øðrvísi er, tá fiskurin fyrst skal keypast, síðan arbeiðast og at enda seljast, vísir virkisleiðarin á Norðís á.

Hann sigur, at tað er ikki bara í Bretlandi, at hendan stoðan er. Tað sama ger seg galdandi fyri eitt nú svartkalva, sum seldur verður heilur til Fraklands.

Ringt at skifta

Petur Mohr er ikki í iva um, at tað optimala fyri føroyska fiskivinnu hevði verið, um vit kundu skorið fiskin í Føroyum og selt fesk fløk regluliga á útlendska marknaðinum.

Nú betraðir útflutningsmøguleikar gevast, skuldi tað verið so líkatil at roynt tað, heldur hann, men ivast samstundis í, um tað nú er heilt realistiskt.

Petur Mohr heldur ikki, at tað kann liggja sum grund, at føroyingar eru ov trekir at laga seg eftir marknaðinum, sum er í løtuni, soleiðis at skilja, at vit skulu leggja framleiðslurnar um, alt eftir hvat heimsmarknaðurin krevur.

– Tað hevði sjálvandi verið best, um vit bara kundu selt fesk fløk, tá marknaður er fyri tí, men so verður tað hinvegin ringt at koma aftur til ta framleiðslu, vit higartil hava havt, eitt nú fryst og roykt fløk. Tí tú fært trupult við at greiða keyparanum frá, at nú passar tað tær hesa vikuna at selja teimum eitt, og næstu viku eitt annað. Marknaðurin er meira bundin enn so. Ert tú farin frá eini framleiðslu, finnur keyparin bara ein annan, sum heldur seg til at lata vøruna regluliga, vísir hann á.

Tíðin

Útflutningur av feskum flaki hevur eisini aðrar avmarkingar, vísir virkisleiðarin á Norðís á. Eitt nú, hvusu long tíð gongur, frá tí flakið er skorið, til tað er etið.

– Tað er nevniliga so, sigur Petur Mohr, at tað ganga altíð einir fýra dagar, frá tí flakið er skorið, til tað er komið til brúkaran. Tað vil siga á europeiska døgurðaborðið. Og tað gerst ikki feskari hesa tíðina.

Vit siggja, tá vit skera fiskin inni á virkinum, hvørjum standi hann er í, og kunnu tá gera av, um vit vilja frysta flakið, ella selja tað feskt. Men tað krevur sjálvandi, at vit hava marknað fyri báðum. Tí kunnu vit ikki bara fara at avskriva frystu vøruna soleiðis, heldur hann.

Betri farmasamband til umheimin kann í ringasta føri hava við sær, at enn meira heilur fiskur fer av landinum, tí bæði bretar og fransar vilja skaffa egnum fólki arbeiði, sum annars kundi verið gjørt av føroyskum flakafólki, heldur virkisleiðarin á Norðís

Kommunal ruta um kommunumørk

Nýggj bussleið byrjar við Skálafjørðin í dag. Tað eru Runavíkar og Skála kommunur, sum í hava sett rutuna á stovn

BUSSLEIÐ
Edvard Joensen

Nýggja bussleiðin við Skálafjhørðin verður nevnd Skálaleiðin. So slepst undan at blanda við aðrar leiðir, siga borgarstjórarnir báðir í tíðindaskrivi.

Leiðin fer at koyra millum Runavík og Skála, sum so hevur við sær, at koyrt eisini verður gjøgnum part av Gøtu Kommunu, nevniliga økið innan fyri Skipanes.

Hóast sagt verður, at høvuðstankin er at fáa fólk úr báðum kommununum, Runavíkar og Skála, at brúka bussin, er helst einki at ivast í, at fólk undan Gøtueiði eisini sleppa við, um tey ynskja tað.

Í fyrsta umfari er ferðaætlan við fimm dagligum túrum løgd, og verður mestur dentur lagdur á morgun- og kvøldtúrarnar, tá fólk ferðast til og frá arbeiði. Tó eru eisini túrar mitt á degi, so fólk kann nýta rutuna til eitt nú ørindi í býnum.

Men rutan kann tillagast tí tørvi, sum væntandi fer at vísa seg, sum fráliður, siga borgarstjórarnir í tíðindaskrivinum.

Avtala er gjørd við tveir lokalar busseigarar, Isaksen og Langgaard, um at røkja rutuna.

Møguleiki verður at keypa vanligan ferðaseðil, 10 -túrakort og mánaðarkort.

Í dag byrjar nýggj bussleið millum Skála og Runavík. Tað eru kommunurnar báðar, sum standa fyri

Springarar í Hvalvík

Teir skera springararnar upp á havnarlagnum í Hvalvík
Mynd: Emma Hansen

Tvær grindir og tveir springarabólkar løgdu beinini í Gjár. Í Hvalba doyðu bæði sporingarar og grind

TÍÐINDI
Emma Hansen, praktikantur

Týsdagin løgdu 35 springarar beinini í Hvalvík. Boðini komu til Politistoðina í Havn kl. 07.23 týsmorgunin.

Springararnir vóru sæddir uttan fyri Kollafjørð. Lítla løtu seinni var bátur eftir teimum, men ringt var at fylgja við, tí ferðin á springarinum var nógv.

Men tað eydnaðist at reka flokkin inn á Hvalvík, har teir vóru dripnir.

Sýslumaðurin í Eysturoy var í Hvalvík og skifti springararnar í drápspartar, og ein annar politistur var við honum. Seðlarnir komu út kl 15.00. Nógv fólk var komið oman á bryggjuna, at fskera upp. Grind var eisini í Havn týsdagin, og har løgdu 42 grindahvalir beinini. Og í Hvalba løgdu 41 springarar og 115 grindahvalir beinini sama dag.

Tom sigur, at Føroyar geva honum nýggjan íblástur til at skriva tekstir

Eg eri ikki bangin fyri veikleika

Ein finskur danskur tónlistamaður , sum eitur Tom Sonntag vitjar í hesum døgum í Føroyum. Hann hevur vøddasvinn og ger sín egna tónleik og framførir av og á. Hann heldur, at Føroyar eru at samanlíkna við sálina, tá hugsað verður um skifti millum ljós og myrkur

SAMRØÐA
Solby A. Eliasen

Klaksvík: - Eg havi ongantíð verið bangin fyri veikleika og eri tað ikki. Eg haldi, at tað er tí at havi livað við mínum breki alt mítt lív og verið noyddur at litið á onnur at hjálpa mær. Tí siggi eg tað sum eitt tekin um styrki , sigur Tom, sum var føddur við vøddasvinni.

Hann heldur, at nátúran í Føroyum er stórsligin og avbera flott at siggja.

- Tað skiftandi veðrið og so eisini skiftið í millum ljós og myrkur kann ein samanbera við sálina, heldur Tom og leggur aftur at, at í Føroyum fær ein sanniliga eyguni upp fyri, hvussu lítil vit menniskju í veruleikanum eru og virðingin fyri náttúruni økist munandi.

Hann sigur eisini, at ein tann størsti munurin á náttúruni í Føroyum og so í Danmark, har hann hevur búð tey seinastu 15 árini, er, at landslagið í Føroyum er so nakið.

- Øll siggja teg tá tú gongur. Tú kanst ikki krógva teg aftan fyri eitt træ, so ein kennir seg naknan í tí føroysku náttúruni. Men tað er ikki nakað ringt í tí, tað er heldur sunt fyri menniskj at ikki kunna fjala seg, men vísa hvør ein er uttan fordómar. Tað er týdningarmikið fyri trivnaðin í einum vinarlag, at ein vísir allar sínar síður, sigur Tom Sonntag.

Tom er í Føroyum á vitjan hjá Jón og Louisu Ellendersen.

- Eg kom at kenna Jón fyri 12 árum síðani gjøgnum Hildibjartur Hansen, sum hevur spælt við Hjarnum. Eg havi síðani tað havt ein feril av longsli at koma til Føroyar, men tað hevur so ikki borið til fyrr enn nú.

Hann heldur, at ein orsøk til at hann hevur viljað sloppið til Føroyar er, at honum hevur altíð dámt havið væl.

- Alskurin til havið er í mínum blóði, haldi eg. Tí brøðurnir hjá mammu míni eru allir sjómenn. Eg havi so ongantíð kunnað verðið sjómaður, og tí dámar mær væl at vera í nánd av havinum, sigur Tom.

Ger egnan tónleik

Tom Sonntag hevur altíð dámt væl tónleik. Hann spælir upp á klaver og syngur. Harumframt ger hann sín egna tónleik eisini. Slagið av tónleiki, sum hann ger, kallar hann fyri norðurlendskan, lyriskan vísujazz. Hann skrivar tekstir um gerandishendingar. Sum dømi nevnir hann hetta at møta einum barni tíðliga um morgunin og siggja tey óseku eyguni. Hvat tað ger við ein og hvussu tað rørir sálina hjá einum.

Hann hevur havt fleiri framførslur bæði í Danmark og í Finnlandi. Men seinnu árini hevur hann eisini verið í Estlandi og havt framførslur. Og sunnudagin komandi fer hann at hava eina lítla konsert í mentunarhúsinum Atlantis.

Hansara brek ger at hann ikki fær arbeitt til dagligt, men hann sigur, at hann fær mikla gleði av tónleikinum.

- Eg livi fyri tónleikinum – men ikki av honum, sigur Tom og tað hoyrist á honum, at hetta kemur frá hjartanum.

Hann sigur, at hann kundi hugsað sær at komið aftur til Føroyar og framført til eitt hvørt størri tiltak, men at tað á hesum sinni bert verður til ta einu lítlu konsertina í Atlantis.

- Tað vóru ikki stundir til at fyrireika nakað stórt tiltak hesuferð, men eg dugi væl at ímynda mær, at eg komi aftur til Føroyar, og tá kundi eg hugsað mær at sloppið at framført saman við onkrum av teimum kendu tónleikarunum í Føroyum.

Tom nýtir tónleikin sum eitt abstrakt mál til at greiða frá veruleikanum, sum hann sjálvur sær hann.

- Eg haldi, at eg siggi veruleikan frá einum øðrvísi sjónarhorni, tí eg siti niðri allatíðina, sigur Tom, sum hevur sitið í koyristóli síðani 1995.

Hann var føddur í Finnlandi, men hevur sum sagt búð í Danmark í 15 ár nú. Har hevur hann egið tónleikastudio, har hann ger sín tónleik.

Ikki búð í Føroyum

Spurdur um hann kundi hugsað sær at búð í Føroyum, svarar hann avgjørdur, at tað kundi hann ikki.

- Føroyar eru ov lítlar til mín, hóast mær dámar væl her. Tá eg sigi, at her er ov lítið, hugsi eg um, at eg havi tørv á at kunna hitta fólk og at koma at kenna tey av tilvild. Tað gevur mær nýtt innlit í lívið og ger alt meiri áhugavert og spennandi. Tí tað er spennandi at hitta fólk og frætta um júst teirra lív og livimáta, sigur Tom, sum ikki vil detta aftur á og enda við at verða eitt vanamenniskja.

Eg vil hava avbjóðingar, og tað kemur helst av mínum breki, tí alt snýr seg altíð um meg og mín tørv, sigur Tom, sum við sínum tónleiki roynir at geva okkurt aftur.

Tá vit byrja at práta um umstøður hjá teimum brekaðu, sigur hann, at Føroyar ikki eru serliga handicapvinarligt land.

Tom situr í elektriskum koyristóli, sum ger at hann kann koma runt uttan hjálp. Men hann sigur, at tað eru tær smáu detaljurnar, sum ongin hugsar um, sum kunnu gera tað ómøguligt hjá honum at koma framat.

- Um eg skal upp um eina gátt, sum er hægri enn sjey sentimetrar, so má okkurt gerast, sum eg kann nýta sum rampa.

Hann leggur aftur at, at tað heldur ikki er so gott í Danmark, men tað er við at batna, serliga tí, at tað koma alt fleiri nýggir bygningar.

Prátið hjá okkum er nú av, og vit fylgjast við honum út, tí hann ætlar sær ein biltúr. Hann hevur ein serbil, sum hann koyrir sjálvur, og tað er hann sera glaður fyri.

- Hesin bilurin ger, at eg kann fara út ein túr, tá tað passar mær uttan at noyðast at biðja onnur koma at koyra meg.

Hann fer í lyftina, sum skal lyfta hann inn í bilin, og vit takka fyri og siga farvæl.